VIÐMERKINGAR

# Viðmerkingar til oddagrein í Sosialinum

**Pf. Atlantic Airways**
**Eyðfinnur Jacobsen**
*nevndarformaður*



Hósdagin 1. februar í ár gjørdi Sosialurin undir "Dagsins meining" (oddagreinini) viðmerkin gar til ætlanina hjá nevndini hjá Atlantsflog um partvísa privatisering av felagnum.

Viðmerkingin vísir tí-verri, at blaðið hevur misskilt okkara ætlan. Nevndin heldur tí, at tað er neyðugt enn eina ferð at umrøða og útgreina ætlanina og heita tí við hesum á blaðstjórnina um at geva okkum neyðuga blaðrúmd á hóskandi stað.

Fyri tað fyrsta er at siga, at ætlanin byggir á, at Føroya Landsstýri framvegis eigur meirilutan (51%) av partapeninginum og at øðrum íleggjarum kunnu bjóðast upp til 49% av partapeninginum.

Í øðrum lagi er ætlanin, at fremja privatiseringina í stigum. Tí verða neyvan meira enn eini 10 til 15% latin øðrum partaeigarum í fyrsta umfari.

Í triðja lagi heldur nevndin tað vera áhugavert og ein styrking av felagnum at fáa føroyskar íleggjarar (einstaklingar og stovnar/fyritøkur) við sum partaeigarar av tjóðarflogfelag Føroya. Ikki minst heldur nevndin, at tað kann styrkja felagið, at fáa starvsfólkini sum partaeigarar.

Í fjórða lagi heldur nevndin, at rúmd skal vera fyri at hava strategiskt samstarv við annað flogfelag úti í heimi. Ein kendur máti at gera hetta uppá, er at bjóða einum slíkum felag ognarlut upp á t.d. 10 til 25%. Tað skal undirstrikast, at samstarv av hesum slag verður ikki gjørt við eitt og hvørt felag og fyri ein og hvønn prís, men einans um so er, at fyrimunir fáast burturúr.

Í fimta lagi heldur nevndin, at tað er rætt at seta hesa ætlan í verk nú, tá hetta fellur saman við arbeiðinum at seta á stovn ein føroyskan virðisbrævamarknað. Nevndin metir tað verða Atlatnsflog til fyrimunar at verða klárir frá byrjan, umframt at hetta eisini skal skiljast sum ein stuðul til hetta arbeiðið.

Í sætta lagi er neyðugt at gera eitt fyrireikandi arbeiði, sum er bæði drúgt og krevjandi. Tá hetta er liðugt, skal endaliga ætlanin leggjast fyri eigaran.

Við hesum vóni eg, at tað nú er øllum greitt, at nevndin hevur onga dulda dagsskrá, men einans er í holt við at styrkja og fyrireika felagið til eina meira dynamiska framtíð í Føroyum, har ein føroyskur virðisbrævmarknaður er partur av gerandislívinum.

# Til allar løgtingslimir

**Maskinmeistarafelagið**
*Niels Th. Pedersen,*
*formaður*
*02.02.2001*

Uppskot til løgtingslóg um bólking o. a. fyri skiparar og manningar á Vaktar- og Bjargingarskipinum Brimli.

Maskinmeistarafelagið skal við hesum harðliga mótmæla, at Føroya Løgting tekur nevnda mál til viðgerðar og við hesum leggur seg út í grundleggjandi rættindi hjá okkum sum fakfelag fyri partar av manningini á M/S Brimli.

Vit vóna, at løgtingslimirnir duga at síggja vandan í, at Fíggjarmálastýrið, sum ikki hevur víst evni ella vilja til at fáa í lag semju við fakfeløgini, kann fara í tingið við uppskoti, hvørs einasta endamál er at fáa ásett við lóg tey ynskir um lønar- og setanarviðurskifti, sum sama Fíggjarmálastýrið hevur viðvíkjandi M/S Brimli.

Vit fara ikki at góðtaka, at Løgtingið letur seg brúka av Fíggjarmálastýrinum í einari lønartrætu, sum fyri langari tíð síðani hevði verið loyst, um Fíggjarmálastýrið hevði víst veruligan vilja til at samráðast um hesi viðurskifti.

Vit loyva okkum eisini at vísa á, at tað fyri okkum er púrasta burtur við, at nevnda lógaruppskot í grein 1 skal geva sama landsstýrismanni, sum er beinleiðis partur í málinum, heimildina at seta eina nevnd, sum skal avgera teir spurningar, sum áttu at verið loystir við samráðingum.

Enn meira ótryggar kenna vit okkum, tá ásett verður í 2. petti í uppskotinum til nevndu lógargrein, at Fíggjarmálastýrið skal velja tríggjar limir í frammanfyri nevndu lóg, meðan felag okkara bert skal tilnevna ein lim.

Vit vóna, at løgtingslimirnir duga at síggja, at tá talan er um vaktarskipið Brimil, so er talan um tríggjar ymiskar sáttmálar, og um so er, at sáttmálaásetingarnar fyri limir okkara skulu ásetast av einari nevnd, er tað púrasta burtur við, at Fíggjarmálastýrið skal tilnevna tríggjar nevndarlimir, meðan felag okkara bert skal tilnevna tann eina.

Samanumtikið er hetta lógaruppskot ein beinleiðis provokatión móti føroysku fakfelagsrørsluni, og vit ávara móti vandanum í, at slík nýggj siðvenja nú skal førast inn á føroyska arbeiðsmarknaðin.

Vit hava ongantíð áður upplivað, at Løgtingið leggur seg út í sáttmálasamráðingar, tá ikki so frægt sum eitt semingsuppskot liggur á borðinum, sum grundarlag hjá Løgtinginum at taka støðu út frá.

Vit hava áður fráboðað, at um lógin verður samtykt, so fara vit at seta tiltøk í verk, og vit skulu bert endurtaka, at um løgtingið veruliga hevur so lítla virðing fyri føroyska løntakaranum, at hesir løgtingslimir taka undir við at leggja seg út í sáttmálaviðurskiftir, sum áttu at verið loyst millum partarnar, so fer hetta uttan iva at fáa sera óhepnar avleiðingar fyri stórar partar av samfelag okkara.

Vit vóna tí inniliga, at løgtingslimirnir vísa virðing fyri føroysku fakfelagsrørsluni, og vanliga løntakaranum og vísa aftur uppskotinum frá Fíggjarmálastýrinum.

# Ein tøkk til íslendingar!

**Kai Vágfjall**



Kæru íslendsku frændir! Tað hitar hjarta okkara, at tit, brøður okkara, veita okkum dyggan moralskan stuðul, í stremban okkara at loysa okkum úr donskum hjálandahafti og vinna okkum fullveldi.

Her hugsi eg m.a. um heimasíðina www.fullveldi.org, har ein hópur av íslendingum hava víst okkum samhuga. Somuleiðis tøkk fyri tær greinar, sum tit hava sent til okkara fullveldissíðu www.fullveldi.fo. Stóra tøkk skulu tit øll hava.

Eina serliga tøkk til altingsmannin Steingrím J. Sigfusson, sum ikki fýrdi fyri at seta danska forsætisráðharranum Poul Nyrup Rasmusen (PNR) næskar spurningar viðvíkjandi fullveldistilgongdini. Samstundis má eg biða íslendingar um umbering fyri ófólkaligu framferini hjá okkara umboði í Norðurlandaráðnum Dan R. Petersen, sum gjørdi øllum føringum fyri skommum.

Tað er hugstoytt, at tað skal finnast í okkara egna landi, slík fólk og slíkur flokkur, sum sigur seg arbeiða fyri javnaða, frælsi og brøðralagi, men sum av øllum alvi renna ørindir fyri eina aðra tjóð, ímóti sínum egnu. Hetta skilja tit íslendingar neyvan, tí slíkir skutilsveinar funnust og finnast ikki í Íslandi. Ísland er reint. Hvat kalla íslendingar slík???

Men eitt eri eg sera harmur um, og tað er at eingir íslendskir ella aðrir norðurlendskir stjórnarlimir hava víst sína ónøgd við harrendu framferðina hjá donsku stjórnini mótvegis føringum. Fyri mær sær tað út, sum um teir ikki vilja fornerma PNR, og geva sostatt Føroyar upp til skutils.

Hevði nakað annað land, longur burturi í heiminum, borið seg soleiðis at ímóti einum øðrum landi, sum Danmark ger mótvegis Føroyum, høvdu helst allar norðurlendsku stjórnirnar talað harliga at, men nú tað er ein norðurlendsk tjóð, sum stríðist fyri frælsi, sær tað út sum um øll hini norðurlondini bara lata eyguni aftur, sum um føringar als ikki eru til fyri teimum.

Einaferð enn stóra takk til allar íslendingar og gott nýggjár.

GUD SIGNIÐ ÍSLAND OG FÓLK TESS!

## Viðmerking

**til tíðindaskriv um ættargranskingarfelag**

Í bløðunum í farnu viku var eitt tíðindaskriv, sum segði frá, at eitt ættargranskingarfelag var stovnað.

Har stendur, at tað varð ein roynd gjørd at stovna eitt slíkt felag, men tað hevur ikki verið nógv at hoyrt til hetta felag.

Hetta vilja vit fegin gera eina viðmerking til, tí okkara felag, sum eitur Ættarbandið, hevur havt nevndarfundir, aðalfundir og almennar fundir við fyrilestrum á hvørjum ári síðani felagið varð stovnað, eisini góvu vit eitt blað út til limirnar í fjør, sum eitur Ættartræið og ætlanin er at fáa tað út aftur í ár.

Tað tykist okkum løgið, at fólk við so stórum áhuga fyri ættargransking, ikki vita at eitt vælvirkandi felag er til.

**Fyri Ættarbandið**
**Maria Jacobsen**
**Elin Midjord**
**Katrin Mørkøre**
**Jóna Lindenskov**
**Andras Joensen**



DAGFØR
TEG
Sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Sosialurin

Í býin - altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin
TAXI
spælir í vikuskiftinum
føroyskt hugnakvøld
verður leygarkvøldið 17. feb.
• turr grind
• turrur fiskur
• spik
• breyð við føroyskum viðskera
Tekningarlisti liggur í barrini.
Kaggin
www.kaggin.fo

fk Matseðilin
Hósdagin 8. feb.: Gullash
Fríggjadagin 9. feb.: Kotelettir
Leygardagin 10. feb.: Culottesteik
Mánadagin 12. feb.: Gjørda haru
Týsdagin 13. feb.: Fiskafrikadellir
Mikudagin 14. feb.: Hamburgarygg
Kostnaður 32,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra - so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO 311234

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

Norðoyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Sjavskapping verður fríggjakvøldið
Njál & Mouritz spæla til dans leygarkvøldið.
Klaksvíkar Klubbi

Sosialurin -har tað hendir

www.sosialurin.fo

Sosialurin -tað loysir seg

Vilja tygum við í
Í býin - hvønn hósdag
Ynskja tygum at lýsa í teiginum *í býin*, so fyllið út henda lepan og sendið hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur